# BØNARLØTAN

**FEBRUAR** **2022** **37. árg.**

***1. Týsdagur*** ***2. Mós. 3.1-22***



*Poul undirvísir ungum sorimimonnum, sum hava tikið ábyrgd í samkomuni.*

## PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)
## Carol og Poul Joensen

Fleiri koronutilburðir hava verið á NTM-skúlanum, og um ársskiftið lógu vit sjálv øll sjúk. Leiðslan í NTM UK hevur avgjørt, at árliga ungdómsstevnan *Reach* verður á netinum. Biðið um vísdóm í fyrireikingunum.

## KRINGVARPIÐ

6. feb. kl. 17 útvarpsmøti, Filadelfia, Norðragøta
13., 20. og 27. feb. Sjónvarpsandakt v. John Færø

## EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á evr.fo)

Sunnukvøld . kl. 21 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## *2. Mikudagur* *Jóh. 2.1-25*



### DANMARK, Kristnastova
### Sólva og Jákup Hansen

Møtini eru sum vanligt, sunnudag kl. 11 og fríggjakvøld kl. 20. Biðið fyri lesandi og øðrum, sum eru komin niður seinastu tvey árini, meðan farsóttin hevur órógvað. Biðið eisini fyri barnafamiljunum í samkomuni, sunnudagsskúlanum og fyri húsbólkunum.



### Susan og Øssur Berghamar

Arbeiðið millum sjúklingar og avvarðandi heldur fram, tó framvegis darvað av koronu. Vit hava ongar andaktir á Sjúklingahotellinum, og bussurin, sum vanliga koyrir fólk til møti í Kristnastovu, koyrir ikki. Biðið, at hesar tænastur byrja aftur skjótt. berghamar@kristnastova.dk



### Dora og Niels Pauli Nónstein
### Sigrid 14, Andreas 12, Kristina 10

## *3. Hósdagur* *Sálm. 8*



**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 11, Leah 8, Abigail 3**

Covid-19 hevur elvt til stórar samfelagsligar trupulleikar í nýggja árinum. Fyrst í feb. byrji eg at arbeiða ein dag um vikuna fyri samkomuna. Biðið fyri nýggju samkomuni, sum vit royna at stovna.

**ZAREPTA**

Biðið, at legur kunnu haldast í ár uttan koronu ella aðrar forðingar og í tryggum umstøðum.

## *4. Fríggjadagur* *2. Mós. 4.1-17*



**ONGLAND, Taunton**
**Dorit og Simon Marshall**

Vit verða í Prag 5-13. feb. Simon skal tala í International Church of Prague tveir sunnudagar. Eisini hittir hann ymisk fólk í Kekkia, sum fáast við trúðboðan har. Okkum tørvar vísdóm um, hvat skal gerast, nú foreldrunum hjá Simon dagliga tørvar hjálp.

**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen,**
**Josva 12, Ester 11, Samuel 7**



## *5. Leygardagur* *Jóh. 3.1-19*



**TÝSKLAND**
**Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 10**

Í dag hava vit fundir á høvuðsstøðini hjá Ethnos 360 her í Týsklandi. Endamálið er at kunna um trúboðanarvirksemi. Biðið, at nógv fólk vitja og veruliga eru áhugað í trúboðan.



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Regluligu sunnudagsmøtini halda nú fram á Zoom orsakað av koronu. Biðið fyri John og teimum elstu.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## *6. Sunnudagur* *2. Mós. 4.18-31*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Markusarevangeliið verður skjótt klárt at senda til St. Andrews til útgávu. Mixtecfólk kunnu nú lesa Orðið á bæði fartelefon og á teldu. Biðið um gott netsamband, um vísdóm at gera neyðugar broytingar og um gott arbeiðslag millum mixtecfólkið.

## *7. Mánadagur* *Jóh. 3.20-36*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Umsetingarráðgevin kemur aftur í februar, nú Lukasar- og Jóhannesar-evangeliið og Estersbók skulu rættlesast. Vit hava nú bíbliutímar fimm ferðir um vikuna. Biðið fyri áhoyrarum og fyri Erik, sum undirvísir.

★ Í dag fyllir Eli Joensen 17 ár

## *8. Týsdagur* *2. Mós. 5.1-23*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen, Adonia 14**

Orsakað av koronu hevur verið lítið virksemi í januar. Vit fara at nýta nógva tíð at fyrireika eitt STEVN undanskeið, eitt 21 daga STEVN tiltak, umframt onnur STEVN tiltøk. Helvtin av upptøkunum er gjørd. Eisini er heimasíðan í gerð. Eg fari at vitja samkomur og onnur støð at tosa um STEVN. Vit umhugsa eitt STEVN átak í Pakistan seinni í árinum.

## *9. Mikudagur* *Jóh. 4.1-26*



**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**

Í jan. doyðu tveir deyvir menn. Vit takka fyri, at boðskapurin náddi teimum. Hóast tilmælini kunnu vit halda áfram við møtunum sum vanligt.

## *10. Hósdagur* *Sálm. 9*



**OM, SUÐURAFRIKA**
**Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**

Vit eru nú byrjað aftur, og ársins evni er *Eitt lív fult av náði og trúgv*. Biðið, at børnini og tey ungu veruliga koma at sanna hetta í lívi sínum. Biðið, av vit liva sum sonn vitni fyri Gudi.

**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 11, Tabita 8, Debora 6, Natan 3**

## *11. Fríggjadagur* *1. Mós. 6.1-22*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

Um nýggjársleitið fylgdu vit tveimum til gravar, sum vóru við til at byrja samkomuarbeiðið í Glostrup Frikirke fyri uml. 30 árum síðani. Vagn Jonsson bleiv 87 ár, og Simona (Mona) Nielsen bleiv 96 ár. Trúgv og trúfesti í samkomuni eyðkendi longu lív teirra.



**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 15, Lydia 4**



**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**

## *12. Leygardagur* *Mark. 4.1-20*



### USA, Alabama, NTM
### Judy og Óli á Grømma Jacobsen

14-22. feb. verða altjóða leiðslufundir her í Alabama við umboðum úr Asia, Norðurafrika, Suðuramerika og Evropa. Hetta verður fyrsti fundur í langa tíð, har vit luttaka andlit til andlits. Á skránni er m.a. ætlanir at senda trúboðarar til nýggj lond, eggja og ráðgeva leiðslum, vegleiða venjingarskúlarnar og mangt annað. Avbjóðingarnar kring heimin eru stórar. Biðið um vísdóm og dirvi.

## *13. Sunnudagur* *1. Mós. 7.1-24*



### GRØNLAND, Qaqortoq
### Marjun og Páll Poulsen

Gamalt var at royna at hava, í hvussu so er, eitt snøri úti fyri at halda fiski undir bátinum fyri ikki missa kennið. Vit hava sjálv onga legu havt í tvey ár, so sambandið við starvsfólk og leguluttakarar er minkað. Biðið fyri hesum, nú vit vónandi sjálv aftur fara at hava legur í summar – tað verður møguliga næstan sum at byrja av nýggjum.



### GRØNLAND, Juvel II
### Gull-Britt og Karsten Hansen

### Anna og Óli Steinberg

## *14. Mánadagur* *Mark. 4.21-41*



**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

Vit hava keypt ein gamlan og bíligan bil, ið hevur tørv á umvælingum. Biðið, at bilurin fæst í stand, so hann kann flyta ymiskt til og frá bátinum í summar og annað. Daniel hevur trupulleikar við hjarta og knæi, so hann fær illa gingið.

⋆ Í dag fyllir Aron Joensen 10 ár

## *15. Týsdagur* *1. Mós. 8.1-22*

**OM, LOGOS HOPE, TeenStreet**

Logos Hope er enn í Gana, og enn er tørvur á fólki umborð. Biðið fyri klaksvíkingunum Miriam S. Olsen, sum verður í Suðurafrika í tríggjar mánaðir, og Sámali Rasmussen, sum nú aftur mynstrar við Logos Hope.



**FØROYAR**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Maria og Jens Bech**
**– Elin og Jógvan Jacobsen, Boas 14**



**ÍSLAND, Akureyri**
**Kristín Gerðalíð**

## *16. Mikudagur* *Mark. 5.1-20*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Samkoman hevur verið virkin her í góð tvey ár, og nú møtast uml. 18-20 fólk regluliga. Til eitt jólatiltak í samkomuni komu nýggj fólk inn, og nøkur teirra koma framhaldandi til tiltøk. Biðið fyri teimum. Nógvar avbjóðingar eru bæði fíggjarliga og við sjúku, men vit gleðast kortini um, at samkoman verður styrkt.



**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

Í jan. var eg í Florida til fund um trygd hjá trúboðarum, og seinni var eg á fundi við NTM-nevndini. Biðið um vísdóm og leiðslu.

## *17. Hósdagur* *Sálm. 10*



**MEKSIKO**
**Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 17, Victoria 15,**
**Emma Grace 14, Jónatan 12,**
**Markus 9, Evita 6, Joy 5**

Biðið fyri okkum; fyri skúlagongdini hjá børnunum og avgerðum viðvíkjandi teirra framtíð. Vit stúra ikki, men onkuntíð kann óvissa gera seg galdandi.

## *18. Fríggjadagur* *1. Mós. 9.1-19*



**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Megan 17, Trisha 9, Emma 5**
Regin skal tosa á stevnu í Týsklandi síðst í mánaðinum. Biðið fyri mammu Heidi, sum hevur diabetes.



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 16, Rebekah 14, Lydia 11**

## *19. Leygardagur* *Mark. 5.21-43*



**FØROYAR**
**Vanja og Svein í Prestgarði**
**Jenny 14, Svend 13, Terji 9, Petra 8**
Vit syngja Alex Bærendsen-sangir í Lívdini 20. feb. og vitja eisini í Kedron í Sørvági. Seinni í ár verður farið til Danmarkar, Noregs og til Grønlands. Biðið, at børn okkara koma til trúgv, og fyri teimum, vit virka ímillum, sum stríðast við rúsdrekkatrupulleikar.



– **Birgit og Svenning av Lofti**
**Atlantic Mission, Juvel II**
– **Rutt og John í Skemmuni**
– **Anna og Símun Pætur**
**á Torkilsheyggi**

## *20. Sunnudagur* *1. Mós. 9.20-10.5*



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 4, Timon 2**

Vit læra alt meira um kovolfólkið, og sum vit skilja tey betur, hava vit størri samkenslu við teimum. Arbeiði okkara skal eftirmetast í næstum. Biðið, at virksemi og menning okkara verða góðkend.

## *21. Mánadagur* *Mark. 6.1-29*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen, Zephaniah 1**

Vit flyta til Indonesia í mars. Biðið, at fyrireikingarnar ganga væl, samstundis sum vit halda á at hjálpa í samkomuni og skulu siga farvæl í næstum.

**Elam Ministries, Evropa**
**Margretha Højgaard Poulsen**

## *22. Týsdagur* *1. Mós 10.6-32*




**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**

Sum støðan er við hjálparfólki í samkomuni í summar, klára vit neyvan at hava fleiri enn tríggjar legur. Onkur verður møguliga bert eitt langt vikuskifti. Vit er glað fyri alla hjálp.

## *23. Mikudagur* *Mark. 6.30-56*



**FILIPSOYGGJAR**
**Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**
Í januar varð Cathy innløgd fyri sukursjúku, og læknarnir stríðast enn við at fáa tamarhald á sjúkuni.



**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Rebekka 16, Hanna 13**

## *24. Hósdagur* *Sálm. 11 og 12*



**ÍRLAND**
**Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**
Nógv orka verður nýtt at koma aftur til ein vanligan gerandisdag, nú farsóttin hæsar av, bæði privat og í samkomuni. Vit eru takksom og undrast á Guds góðsku.



**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 12, Nana 10, Louie 8, Rio 2**



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 13, Noah 12, Karis 8,**
**Judah 6, Ethan 4**

Vit hjálpa leiðslutoymi okkara á trúboðaramiðstøðini nakrar mánaðir, og eg skal eisini vitja Mengensamkomuna. Biðið fyri lítla toymi og samkomu okkara í Lele.



**PAPUA NÝGUINEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 5, Jude 3, Evelyn 1**

Vit fyrireika ferð til Papua Nýguinea í summar, har ætlanin er at stovna samkomu. Biðið fyri okkum.



**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**



**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 12**

Í vár er ætlanin at vitja bygdina í Guinea, har vit hava virkað. Biðið, at vitjanin verður til signing.



**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 8, Micah 8**

⋆ Í dag fyllir Elizabeth Niclasen 16 ár

**Útgevari** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd** Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla** Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
**Uppseting** Palli Skorheim, tel. 290087



## FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM
## Liz og Ragnar Niclasen

Stutt fyri jól lótu 10 ung seg doypa í bygdini Lenga. Tvey teirra eru tey fyrstu trúgvandi í familjuni, so roknast kann við mótstøðu. Biðið, at Harrin styrkir og gevur teimum dirvi til at standa ímóti álopum.




## TEILAND, Chiang Mai
## Corine og Sørin Joensen
## Eli 17, Aron 10, Noah Kristian 8

Okkara virksemi í The Well International er framvegis skert orsakað av Covid-19.

★ Í dag fyllir Rebekah Niclasen 14 ár

**Myndasavn** pallis76@yahoo.dk
**Prent** Føroyaprent, tel. 314555
**Teldupostur** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða** www.kbs.fo

©KBS. *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

## *28. Mánadagur* *Heb. 2.1-18*

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

## NÝGGJ BÓK!

**258 síður 220 Kr.**




Í 1993 fingu hjúnini Norine og Andrew Brunson kallið at flyta til Turkalands at bera fólkinum gleðiboðskapin. Har møttu tey eini røð av trupulleikum og hóttanum, men tey gleddust kortini um at stovna nýggjar samkomur. Tá ið tey hjálptu flóttafólki úr Sýria, m.a. kurdum, mistonktu myndugleikarnir tey at vera njósnarar. Í 2016 vórðu tey handtikin; Norine varð leyslatin, meðan Andrew varð fongslaður og ákærdur fyri at hava fyriskipað statskvett. Andrew greiðir frá, hvussu tað er at verða fongslaður, ákærdur, hóttur, ófullkomin, áhaldandi, trúfastur og aftur frælsur.

Jákup Nolsøesgøta 17, Tórshavn
Opið týs.-frí. kl. 14:00-17:30
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo

BÓKASØLAN logos